# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Vit eru av órøttum blakaðir út úr steypakappingini.*
*Hallur Danielsen, formaður í P/F Havnar Fótbólti*

# KÍ fær ein møguleika afturat



**HB skal verja seg eftir langa ferð og gott avrik, meðan KÍ hevur møguleika at koma fyri seg eftir stutta ferð og lítið sannførandi avrik**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

HB hevur nógv jørn í eldinum í hesum døgum. Teir eru við í Intertoto Cup, og tað ber við sær landskappingardystir mitt í síðstu viku og í annaðkvøld og fótbóltsferð til Baltikum í vikuskiftinum og heimadyst í Intertoto næsta vikuskifti.

HB hevur nógv fólk, og teir skifta eitt sindur ímillum summar spælarar. Tí kann roknast við, at onkrir, sum ikki fingu møguleikan í Intertoto sunnudagin, fara at fáa møguleikan í annaðkvøld, tá ið HB í Klaksvík fer at royna at halda tørn um góðu støðuna í oddinum.

**Lagið minni gott**

Í Klaksvík er fótbóltshýrurin ikki so góður, sum hann var fyrr í ár. Úrslitini síðani fyrst í mai tala fyri seg, og tað kann valla gerast minni sannførandi, enn tað var í Fuglafirði sunnudagin. Men KÍ er framvegis ikki so langt frá toppinum, og um tað eydnast teimum at fáa fult í kvøld, fer stigatalvan at bera boð um, at tað framvegis skal roknast við KÍ.

Tá ið liðini hittust í Klaksvík fyrr í ár javnaði KÍ til 2-2 í síðsta minutti, eftir at HB leingi hevði verið omaná, og KÍ síðstu løtuna hevði trýst nógv.

Sum tað varð nevnt undan vikuskiftinum, so er Iulian Florescu ikki longur partur av KÍ liðnum. Mánakvøldið vandi hann í Fuglafirði. Einasta ivamálið í Klaksvík er Sinisa Jovevic. Mánakvøldið hildu KÍ spælararnir frí. Tá vandi serbin fyri seg sjálvan.

# HB vil stríðast til tað síðsta

HB-MÁLIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í gjár tók Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum umsíðir avgerð í málinum um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen í steypadystinum millum HB og VB/Sumba.

Dómsnevndin staðfestir avgerðina hjá kappingarnevndini um, at HB skal koyrast úr steypakappingini, tí spæliloyvið hjá einum HB-spælara var ikki í lagi til dystin.

Tað eru nærum 90 dagar gingnir, síðani teir 90 minuttirnir á vøllinum vórðu spældir, og enn er málið ikki heilt liðugt.

– Vit halda, at HB hevur verið fyri mismuni í hesum málinum, og vit hava longu kært dómin inn fyri Ítróttardómstólin, sigur Hallur Danielsen, formaður í P/F Havnar Fótbólti.

**HB vónar framvegis**

Eftir at Dómsnevndin hjá FSF staðfesti úrskurðin hjá kappingarnevndini, er tað VB/Sumba, sum skal spæla fjórðingsfinalu ímóti EB/Streymi í kappingini um Løgmanssteypið. Enn hevur kappingarnevndin ikki ásett, nær dysturin skal spælast, men tað skal gerast innan stutta tíð, tí hálvfinalurnar eru farnar at nærkast.

Ítróttardómstólurin skal eisini taka eina skjóta avgerð, so at seinasta fjórðingsfinalan kann avgreiðast.

Í HB vóna tey framvegis, at felagið sleppur at spæla dystin.

– Vit eru av órøttum blakaðir út úr steypakappingini. Vit hava víst á, at vit lótu øll neyðug skjøl inn til FSF, og tí hava vit einki skeivt gjørt. Hinvegin vísir minnilutin í Dómsnevndini á, at skilið kanska ikki er so gott í FSF, og tað kann eisini hugsast, at FSF hevur gjørt eitt mistak í málinum, sigur Hallur Danielsen, formaður í P/F Havnar Fótbólti.

# Lukasz gjørt nýggjan sáttmála við Brøndby

**Fyrrverandi VB-spælarin, Lukasz Cieslewicz, hevur gjørt nýggjan sáttmála við danska stórfelagið Brøndby. Lukasz heldur fram í felagnum næsta hálvtannað árið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað gekk sera væl hjá álopsspælaranum Lukasz Cieslewicz í Brøndby undan summarsteðginum. Lukasz slapp at royna seg á næstbesta liðnum hjá Brøndby, har nógvir ungir spælarar royna seg, og hann skoraði mest sum mál í hvørjum dysti.

Hetta hevur fingið Brøndby at bjóða Lukasz ein veruligan sáttmála. Lukasz hevur havt eitt slag av lærlinga sáttmála, men nú hann er blivin 18 ára gamal, hevur hann fingið ein veruligan sáttmála við danska felagið.

Lukasz og Brøndby eru komin ásamt um, at Lukasz skal halda fram í felagnum í hálvtannað ár afturat í fyrstu syftu. Sáttmálin er komin upp á pláss, og hann gevur greiðar ábendingar um, at Brøndby sær nakað stórt í unga spælaranum úr Póllandi, sum hevur búð nógv av sínum barnaárum í Suðuroynni.